# Húsamekling

## Vit selja húsini



### Ovari vegur 15, Oyndarfjørður

**Stødd á húsum:** ..............104 m² x 2
**Stødd á grundøki:**...........600 m²
**Byggiár:** ..........................1983
**Kostnaður:**.......................Hóskandi boð ynskist

Talan er um eini hús frá 1983, ið eru í góðum standi. Húsini liggja tærr við høvuðsveg, men tó í góðum og friðarligum umhvørvi við frálíkum útsýni yvir fjørðin. Túnið er stoypt omanfyri húsini, og hoyrir ein stórur havi til ognina. Sólargangurin er góður.



### Á Frælsinum, Tórshavn

**Stødd á húsum:** ..............100 m² x 3
**Stødd á grundøki:**...........598 m²
**Byggiár:** ..........................1969
**Kostnaður:**.......................Hóskandi boð ynskist

Talan er um stór hús frá 1969 í góðum standi. Húsini standa væl fyri í vesturbýnum, og eru tey í trimum hæddum við carportur og hjalli. Húsini standa í góðum barnavinagligum umhvørvi, við sera góðum útsýni yvir býin og Nólsoyarfjørð. Stuttur teinur er til skúla, barnagarð, handlar og gott busssamband er til miðbýin. Vakur urtagarður er rundan um húsið, og sólargangurin er góður.



### Undir Ryggi 15, Tórshavn

**Stødd á húsum:** uml. 30 m² + loft og kjallara
**Stødd á grundøki:**...........47 m²
**Byggiár:** ..........................?
**Kostnaður:** Boð undir kr. 1.000.000,- ongan áhuga.

Húsini eru eini lítil, hugnalig hús, sum standa í tí gamla býarpartinum, nærindis Kongabrúnni í Tórshavn. Ymiskar umvælingar eru gjørdar við húsini, og hava tey flagtekju. Stuttur teinur er til handils, caféir, býarlív og mangt annað.



### Varðabú 24, Tórshavn

**Stødd á húsum:** ..............86 m² x 2
**Stødd á grundøki:**...........601 m²
**Byggiár:** ..........................1955
**Kostnaður:**.......................Hóskandi boð ynskist

Húsini eru eini sethús í tveimum hæddum. Tey eru vælhildin og í góðum standi, og hava bert havt ein eigara. Húsini standa í barnavinarligum og friðarligum umhvørvi við blindan veg, og hava gott útsýni yvir Nólsoyarfjørð. Rundan um húsið er urtagarður á uml. 500 m².



### Suðurstíggjur 1, Argir

**Stødd á húsum:** ..............119 m² + kjallara, loft, hjall
**Stødd á grundøki:**...........581 m²
**Byggiár:** ..........................1979
**Kostnaður:**.......................Hóskandi boð ynskist

Talar er um eini stór sethús, sum eru í góðum standi. Grundøkið er 581 m² til støddar, og er havi við trøum um húsini. Tey standa væl fyri í friðarligum, barnavinarligum og veðurgóðum umhvørvi við góðum sólargangi og góðum útsýni. Somuleiðis er snotulig íbúð í kjallaranum.



### Eiriksgøta 12, Tórshavn

**Stødd á húsum:** ...............100 m² + hjall
**Stødd á grundøki:**...........240 m²
**Byggiár:** ..........................Uml. 1952
**Prísuppskot:**....................1.700.000,-

Húsini eru eini eldri eittplanshús, sum liggja væl fyri mitt í Havnini. Umhvørvið er friðarligt og barnavinarligt. Eisini er veðurgott og góður sólargangur. Stuttur teinur er til handils, og bussambandið er gott. Húsini hava nýggjan ketil og nýtt oljufýr.



### Snotulig hús í Hoyvík



**Adressa:** ..............Millum Gilja 28, Hoyvík
**Stødd:** ...................128 m² x 2 + garagu 45 m²
**Grundøki:** ............716 m²
**Kjallari:**................Køkur, stova, 1 kamar, wc/bað, fýrrúm
**Miðhædd:**............Køkur, stova, hjúnarúm, 2 kømur, wc/bað, wc. og gong
**Loft:**........................Ovasta loft
**Byggiár:** .............1987
**Kostnaður:**...........Hóskandi boð ynskist
**Yvirtøkudagur:**.....Eftir avtalu

Húsini standa í friðarligum og barnavinarligum umhvørvi við blindveg og hava gott útsýni. Tey eru í góðum standi og hava eina snotuliga íbúð í kjallaranum. Stórt stykki og laðaður garður er um húsini, og parkeringsviðurskiftini eru góð.

**www.husamekling.fo · husamekling@husamekling.fo · Vaglið · Tórshavn · Tel. 323000 · Fax. 323001**

Sosialurin